# Sosialurin

Nr. 234 • týsdagur • 6. desember 2005 • 79. árgangur • Kr. 13,00

www.sosialurin.fo




## Oddbjørn skal venja TB

Ítróttur 14



Bárður Oskarsson:

## Innstillaður til bókavirðisløn

síða 9



C21 og ALX:

## Góðskan var føroysk

síða 22-23



Høgni Hoydal:

## Útlendingamálið var avgreitt

síða 5



# Nú kemur ferð á oljuleitingina

**Komandi tvey árini verða sera áhugaverdir leitingarbrunnar boraðir við Føroyar. Tveir nýggir brunnar verða boraðir í føroyskum øki, meðan trígg- ir verða boraðir beint hinumegin markið. Basaltið er framveigis stóri knút- urin, men stjórin á Oljufyrisitingini sigur, at talan er um stór frambrot við nýggju brunnunum. Hósdagin verður sáttmáli undirskrivaður millum átta oljufeløg um at bora í 2006**

Vinnusíður 16-17













VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL
Nr. 234 • týsdagur • 6. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

Oljuleiting við Føroyar:

# Fara skjótt at fyrireika 3. umfar



OLJULEITING - 3. UMFAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Oljufyristingin er í løtuni við at fyrireika eitt nýtt útbjóðingarumfar á heysti 2007. Tvs. at loyvini í 3. leitiumfarinum á føroyska landgrunninum verða latin um ársskiftið 2007-08. Tá er so eisini møguleiki fyri, at økini frá 1. útbjóðing, sum tá helst verða latin aftur til myndugleikarnar, verða boðin út aftur. Haraftrat verða økini, sum vórðu nominerað av oljufeløgunum til 2. rundu, helst eisini við í eini nýggjari útbjóðing. Enn er tó ikki avgjørt, hvørji øki talan verður um og hvussu langt norður eftir farið verður.

Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Oljufyrisitingini sigur, at áðrenn ein slík útbjóðing kann gerast, mugu vit tryggja okkum, at tær umhvørviskanningar, sum skulu gerast, eru gjørdar. Tá 1. útbjóðing var gjørd, varð tó ein stórur partur av føroyska økinum kannaður og kortlagdur, og tað njóta vit gott av í dag.

Tá vitjað verður á Oljufyrisitingini er tað fyrsta tú varnast, at stóra loyviskortið yvir Føroyaøkið er broytt. Uppdateraða kortið vísir, at upprunaliga loyvið hjá BP og Shell frá fyrstu útbjóðing er horvið. Loyvið gongur annars út 17. august í 2006, men nú hevur BP so boðað frá, at tað letur loyvið aftur til føroysku myndugleikarnar. BP hevur ikki áhuga í hesum økinum longur, og tað kostar eisini at liggja á tí. Hetta ger so, at oljufyristingin hevur møguleika at bjóða hetta økið út aftur í einum nýggjum og komandi útbjóðingarumfari. Henda møguleika kunnu Statoil og Amerada Hess eisini velja, nú tey flyta sínar boriskyldur úr seks ára loyvunum longur inn á landgrunnin.

Stjórin á Oljufyrisitingini sigur seg vóna, at feløg fara at vísa økjunum frá 1. útbjóðing áhuga aftur, tá tey helst verður boðin út aftur um tvey ár, ikki minst tí, at eitt fund (Marjun, blaðm.) varð gjørt fyri nøkrum árum síðani. Ikki minst tá man veit frá royndum, at tað, sum ikki er lønandi í ár, kann verða tað um nøkur ár. M.a. kann oljuprísurin ávirka hetta. Verður ein útbygging tætt við hinumegin markið, so kann tað eisini hava ávirkan.

- Hvussu við Marjunkelduni, sum einaferð fekk so positiva umrøðu:

- Her er bert ein brunnur boraður, og ein brunnur er ikki nokk til at etablera eina vitan, sum er nóg góð til at siga við vissu, hvussu støddin er á kelduni. Tú hevur eitt hol, sum liggur djúpt og so hevur tú eitt sindur av seismikki. Tvs. at tað er nógv óvissa knýtt at kortleggingini. So man má royna at draga feløg til at koma inn og arbeiða við hesum. Vónandi fær man ein brunn aftrat í eini møguligari nýggjari útbjóðing. Enn er tað so Amerada Hess, sum eigur hetta loyvið, sum gongur út seinast í 2006.

Nú størri partur av landgrunnin skal bjóðast út aftur sigur Sigurð í Jákupsstovu, at tey gera einki uttan at tað er í samráð við fiskivinnu- og umhvørvisáhugamál.

Sigurð í Jákupssstovu heldur tað sær lovandi út fyri Atlantsmótið sum heild. -Vit síggja, at virksemi veksur nógv vestan fyri Hetland, og áhugin er eisini vaksandi fyri Føroyar. Tað peikar rætta vegin.

## Oljurisin Chevron á oljutinginum

**Oljutingið hevur jólating 6. desember kl. 19.00 á Hotel Føroyum, har ein av nýggju fyritøkunum á føroyska landgrunninum, stóra og altjóða oljufelagið Chevron er í fokus.**

TÍÐINDASKRIV



*Trond Unneland, stjóri hjá Chevron, verður høvuðsrøðari á Oljutinginum í kvøld*

Chevron, sum er eitt av teimum mest virknu oljufeløgunum á Atlantsmótinum, er fyristøðufelag í samtakinum, sum fann olju á Rosebank/Lochnagar leiðini á bretska landgrunninum tætt við føroyska markið seinasta summar. Chevron hevur boðað frá, at nógv virksemi fer at verða á hesum øki komandi summar – helst verða boraðir tríggir avmarkingarbrunnar. Oljutingið er fegið um at kunna bjóða Trond Unneland, stjóra hjá Chevron í Danmark, at halda fyrilestur um virksemið hjá Chevron við serligum denti á møguleikarnar á Atlansmótinum.

Trond Unneland, sum hevur drúgvar royndir frá oljuídnaðinum, hevur starvast hjá Chevron síðani 2000. Áðrenn tað arbeiddi hann í 16 ár hjá Statoil. Trond Unneland er reservoir verkfrøðingur og hevur eina PhD í oljuverkfrøði frá universitetinum í Tróndheimi.

FIAT PANDA 4x4
4-HJÓLS TREKK PERSÓNBILUR



FYRI EINANS KR. 160.000,-

nordcar
SMIÐJUGERÐI 4 · TÓRSHAVN · TEL. 30 80 80
Telefon uttanfyri arbeiðstíð: 22 80 90

Sigurð í J ákupsstovu, stjóri á Oljufyrisitingini:

# Tað gongur rætta vegin

**- Tað gongur avgjørt rætta vegin. Áhugi er fyri leiting á Føroyaøkinum. Vit fáa tveir brunnar á basaltinum komandi tvey árini. Tað er framvegis basaltið, sum er ein forðing fyri leitingini, men tað at vit fáa flutt og borað brunnar er eitt stórt frambrot. Oljufund hinumegin markið er eisini eitt frambrot, sum vónandi eisini hevur við sær leiting okkara megin sigur Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Oljufyrisitingini, nú tilsamans 9 oljufeløg hava avgjørt at bora á landgrunninum komandi tvey árini**

**OLJUPRÁT**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Stjórin á Oljufyrisitingini, Sigurð í Jákupsstovu heldur tað vera gott við bjartskygni, men at man eigur at vera meira varin og realistiskur enn galdandi var fyrst í 2000, tá vónirnar vóru skrúvaðar dekans ov nógv upp. Varisligt bjartskygni er best boðið uppá framtíðina*

*Mynd Jens K Vang*

Hóast lítið hevur verið at frætta frá Oljufyrisitingini í eina tíð, so merkir tað ikki, at tey, sum har starvast, hava lítið at takast við. Tvørturímóti hevur stovnurin fingið hópin av uppgávan. Men ein tann mest spennandi uppgávan er framvegis leitingin eftir olju og gassi í føroysku undirgrundini. Herfyri varð Sigurð í Jákupsstovu settur sum stjóri fyri samanlagda stovnin, Jarðfrøðissavnið og Oljufyrisitingina.

Nýggi stjórin er ikki ein maður við nógvum orðum. Men tá hann tekur blaðið frá munninum er hann greiður og avgjørdur. Síðani BP og Shell gjørdu av at flyta sínar brunnar inn á 9 ára loyvið hjá Anadarko og nú tað liggur í kortunum, at Statoil og Amerada Hess fara at flyta sínar brunnar inn á basaltið eisini, er góður hýrur á oljustjóranum. Og tað ger ikki lagið verri, at oljufeløg beint hinumegin markið fara at bora fleiri brunnar har í vár, tí hesir kunnu geva okkum týðandi upplýsingar.

Sigurð í Jákupsstovu sigur, at tey hava leingi havt samráðingar við feløgini um at flyta teirra arbeiðsskyldur frá verandi seks ára loyvum yvir á níggju ára loyvini. Tað var hetta, sum hendi herfyri, tá BP og Shell fingu góðkent at flyta sínar boriskyldur inn á loyvi sjey ímóti, at tey bora ein subbasalt brunn í tí økinum. Síðani verður arbeitt við enn eini ætlan, har oljusamtøk við Statoil og Amerada Hess sum fyristøðufeløg skulu flyta sínar brunnar inn á loyvi seks. Nú er henda avtala við at koma undir land. Hósdagin komandi verður hon undirskrivað í Oljufyrisitingini.

Sigurð í Jákupssstovu sigur, at tað er sera gott, at hetta hendir, soleiðis at hesar skyldurnar verða fluttar inn á loyvi seks og soleiðis, at ein brunnur verður boraður komandi summar. Boripallur er eisini tøkur til hesa boring. Og so liggur í kortunum, at hin hjá BP verður boraður árið eftir. Hetta merkir, at vit fáa tveir brunnar inni á basaltøki komandi tvey árini, og er ótrúliga spennandi.

## Góð nýggj byrjan

Uppá fyrispurning um tað er gott nokk fyri at varðveita áhugan fyri føroyska økinum, at tað nú verður lagt upp til, at tveir brunnar verða boraðir komandi tvey árini sigur oljustjórin:

- Tað haldi eg, tí hetta eru tveir sera neyðugir brunnar fyri at fáa tað vitan man skal hava fyri at kunna fara víðari í føroyska økinum. Og haraftrat kemur, at tað er virksemið beint hinumegin markið, har vit vita, at ikki færri enn tríggir brunnar skulu borast á Rosebank/ Lochnagar økinum. Úrslitið av teimum brunnunum kann eisini fáa ávirkan á, hvussu okkara egna øki fer at útvikla seg. So allir hesar brunnar báðumegin markið eru sera spennandi fyri føroyska økið og koma at halda grýtuni í kók í eina tíð í hvussu er, men alt veldst sjálvandi um úrslitið.

Tað at sleppa niður gjøgnum basaltið og fáa vita um, hvussu jarðfrøðin sær út niðri undir basaltinum er tann týdningarmikli brikkurin í framtíðar leiting.

- Merkir hetta ikki, at vit fara nærum út í púra ókent "ongamannaland", tá tað verður borað aftur á landgrunninum?

- Tað kann man gott siga, tí tað er langt frá landssynningshorninum, har fyrstu brunnarnir vórðu boraðir, og somuleiðis er langt til Rosebankkelduna hinumegin markið. Men oljufeløgini hava so kortini ávísa vitan um hesar nýggju leiðirnar inni á basaltinum.

Hetta verður so fyrsta roynd at bora ígjøgnum basaltið. Tað var annars roynt í Lopra í síni tíð, men tá kom man heldur ikki gjøgnum basaltið. Feløgini fara so eisini at fáa royndir at arbeiða við basaltinum á okkara øki, og tað kann fáa stóran týdning fyri framtíðina. Slíkar boringar gjøgnum basalt kunnu so eisini vera við til at loysa ella loysa upp fyri basaltknútinum.

Enn er ov tíðliga at siga, hvussu tjúkt basaltið er, har tað nú skal borast, men helst er talan um ein til tveir kilometrar.

## Nøgd við gongd

Sigurð í Jákupsstovu sigur, at tey á Oljufyrisitingini eru nøgd við gongdina á oljuøkinum og leggur aftrat, at tað gongur so avgjørt tann rætta vegin.

Vórðu hesir brunnarnir ikki fluttir, sum tað nú




*Føroyakortið er broytt, nú BP og Shell hava latið aftur loyvið 003 frá fyrstu útbjóðing. aftur til føroyskar myndugleikar. Tað verður so við í eini 3. útbjóðing.*

*Kelda Oljufyrisitingin.*

verður lagt upp til, so var eitt alternativ, at oljufeløgini rindaðu landskassanum so og so nógvar milliónir heldur enn at bora. Tað hevði ikki verið gott sigur Sigurð í Jákupsstovu, tí tað fremur so ikki oljuleiting í Føroyum.

-Tað, sum vit mugu syrgja fyri, er at fáa so góða oljuleiting í Føroyum sum gjørligt, og tað meina vit, at vit kunnu fáa við kombinatiónini við at flyta hesar brunnar inn á loyvisøki, sum eru givin í fyrsta loyvisumfari og við annað útbjóðingarumfar. Tey bæði átøkini tilsamans fremja føroyska leiting fleiri ár framyvir.

-Hvussu nógv hevur Oljufyrisitingin verið við í samráðingunum um at flyta brunnarnar?

- Ein kann siga, at vit hava verið aktiv á síðulinjuni. Tað hevur verið eitt samstarv við oljufeløgini um at finna fram til ta bestu loysnina. Tá tað hevur snúð seg um arbeiðsskráir og treytir, tá hava verið samráðingar millum fyrisiting og fyristøðufeløg.

## Skilagóð tilrættalegging

- Er tað eitt pluss fyri leitingina, at eitt felag sum Anadarko, ið higartil ikki hevur havt nakrar boriskyldur, nú verður við í einum og helst tveimum brunnum?

-Tað er so avgjørt eitt pluss, at góð oljufeløg eru við til at bora brunnar, og Anadarko er eitt gott felag sigur Sigurð í Jákupsstovu og heldur fram:

- Tað, sum er vert at leggja til merkis, er, at føroysku myndugleikarnir, tá man fyrireikaði 1. loyvisumfar, fingu níggju ára loyvini við. Teir vóru greiðir yvir, at her vóru nakrir møguleikar, og teir fingu feløgini til at bjóða uppá hesi økini eisini. Tey fingu so eina seks ára periodu fyri at vita, um tey vildu halda fram og binda seg til boringar. Hevði tú bara givið seks ára loyvini á sinni, og ikki hevði níggju ára loyvini við, so hevði tann vitanin um níggju ára loyvini, sum tú í dag hevur, ikki verið tøk, og tá hevði tú als ikki kunnað flutt hesar brunnarnar nú. So man hevur hugsað sera skilagott og langt tá. Hetta kann ikki undirstrikast nokk.

Eingin kundi vita, hvussu hetta fór at ganga, áðrenn borað varð, men tað at myndugleikarnir vóru so mikið framskygnir, at teir søgdu, at vit mugu hava hesi økini við eisini fyri at fáa tey kanna eisini, er nú grundarlagið undir komandi brunnum.

## ENI møguligan brunn

Nú bendir so nógv á, at fleiri brunnar verða boraðir á landgrunninum komandi árini.

Umframt teir báðar basaltbrunnarnar eru eisini ábendingar um, at ENI og Føroya Kolvetni, sum standa fyri loyvi fimm, ið er eitt níggju ára loyvi frá fyrstu útbjóðing, koma við eini arbeiðsskrá rættiliga skjótt. Feløgini skulu taka støðu til í hesum árinum, hvat tey ætla at gera í hesum loyvinum. Tað er ikki óhugsandi, at tey vilja bora har í 2007 ella 08 skilst.

Sigurð í Jákupsstovu veit ikki í løtuni um onnur feløg, sum vilja koma sær uppí leitingina, men tað er einki at ivast í, at fleiri feløg fylgja væl við gongdini.

Tað er annars nógv virksemi á Oljufyrisitingini sum er. Og so skjótt boringar nærkast so verður uppaftur meira at gera á trygdar- og umhvørvisøkinum.

Nógvur seismikkur varð skotin á landgrunninum í summar. Longu nú vita tey um, at felagið, TGS Nopec fer at skjóta seismikk næsta summar fyri egna rokning, eitt sokallað spec-survey.

Tað gongur rætta vegin eru tey á Oljufyrisitingini samd um. Tað er áhugi fyri leiting her. Tað er framvegis basaltið, sum er ein forðing fyri leiting. Men tað at vit fáa flutt og borað brunnar er eitt stórt frambrot. Fund hinumegin markið er eisini eitt frambrot, sum vónandi eisini hevur við sær leiting okkara megin.

Bæði stjórin á Oljufyrisitingini, Sigurð í Jákupsstovu og kunningarleiðarin Súsanna Sørensen halda tað vera gott við bjartskygni men siga samtíðis, at vit mugu vera meira varin og realistisk enn galdandi var fyrst í 2000, tá vónirnar vóru skrúvaðar dekans ov nógv upp. Varisligt bjartskygni er nokk tað, sum hóskar best at brúka.

## Nógvar uppgávur

Oljufyristingin fevnir í dag um oljuleiting, orkumál, jarðfrøði og náttúrulandafrøði. Fyrr vóru Oljufyristingin og Jarðfrøðissavnið tveir stovnar. Teir eru nú lagdir saman til ein. Stovnurin fer tí í næstum at fáa eitt nýtt felags navn.

Stovnurin hevur í dag ábyrgdina av oljuleiting á føroyskum øki og jarðfrøði generelt.

Tey eru í løtuni í ferð við at dagføra føroysku jarðfrøðina við nýggjum jarðfrøðikortum og verður bókin hjá Jóannes Rasmussen, sála dagførd. Ein nýggj bók og kort um Føroya jarðfrøði koma út um ársskiftið 06-07. Ein ungur breti, Simon Passey, sum hevur arbeitt við føroyskari jarðfrøði leingi og sum tók PhD í føroyskari jarðfrøði Bretlandi er ein av høvuðsmonnunum aftanfyri hesa verkætlan.

Í oljuleitingardeildini, sum er loyvisumsitingin, verður fylgt við í øllum loyvunum og menna tey nýggja vitan til tess at finna kolvetni á føroyskum øki. Stovnurin fær atgongd til allar upplýsingar feløgini fáa, og tað gevur honum gott grundarlag at granska og menna nýggjar myndlar fyri leiting í Føroyum.

Undir jarðfrøðideildini er grein 76 verkætlanin, sum hevur til endamál at útvega prógv fyri, at føroyski landgrunnurin røkkur longur suðureftir enn staðfest í dag.

Her er talan um samstarv millum jarðfrøðideildina og GEUS.

Stovnurin tekst so eisini við náttúrulandafrøði. Tað nýggjasta økið er orkumál.

# Oljuprísir og alternativ orka á oljuráðstevnu

**Mikudagin 17. januar skipar Oljuvinnufelagið hjá Vinnuhúsinum fyri oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum.**

OLJURÁÐSTEVNA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Hetta er tann ráðstevnan, sum verður hildin á hvørjum ári. Hesaferð er rættiliga fjølbroytt skrá. Fokus verður sett á oljuleitingina við Føroyar, á oljuprísir og á alternativar orkumøguleikar.

Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum sigur, at tey í ár royna at seta skjøtilin á fleiri ymsar tættir í olju- og orkumálum. Fyrst og fremst verður ljóskastarin settin á oljuleitingina við Føroyar. Bert fáar mánaðar eftir ráðstevnuna verður eftir øllum at døma borurin settur í føroyska basaltið fyri fyrstu ferð. So hetta er eitt sera aktuelt evni at taka upp á oljuráðstevnuni.

Síðani stendur oljuprísurin fyri tørni tvs. hvørja ávirkan hann hevur á føroyska samfelagið.

Seinnaparturin er settur av til eitt sera viðkomandi evni, nevniliga alternativ orkuveiting í einum føroyskum høpi. Ein orsøkin til at man hevur valt hetta evnið er tann, at oljuprísurin er so høgur, og at hann tá hevur sera stóra ávirkan á okkara búskap. Magni Arge sigur, at hetta er eisini ein orsøk til, at man ikki bara hyggur at gongdini í oljuleitingini men eisini fer til kjarnuna í orkumálinum sum heild. Og tá er tað so náttúrligt at fylgja hesum upp við at hyggja at teimum orkuhættum, sum vit brúka í dag og hvørjar aðrar tættir, sum eru minni oljukrevjandi, man kann taka upp.

- Kunnu vit føroyingar ganga undan í menning av alternativum orkuveitingum, tá er greitt, at hetta verður serstakliga spennandi. Her hugsi eg um alduorku men eisini um aðrar orkuhættir. Danir hava m.a. fingið nógv burtur úr at vera frammaliga í vindorku, og íslendingar hava verið frammaliga í brintorku. So kunnu vit ganga undan eitt nú innan aldurorku og annars troyta aðrar orkukeldur í størri mun, so hevði tað havt alstóran týdning.

Ráðstevnan er fyri bæði føroyingar og útlendingar. Hon verður á enskum máli.




*Marni Arge, stjóri og formaður í Oljuvinnuráðnum*

# Magni Arge: Borið tveir brunnar í 2006

**-Tað hevði verið best fyri vinnuna um tveir brunnar vórðu boraðir í 2006 heldur enn ein tá og ein árið eftir. Tað hevði verið stórur fyrimunur fyri føroyskar tænastuveitarar, um báðir brunnarnir løgu í forlongilsi**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Atlantic Airways ætlar sær at vera við, tá oljubrunnar skulu borast í komandi ári og í 2007. Magni Arge, stjóri og formaður í Oljuvinnufelagnum heldur, at tað er uppá tíðina, at tað verður borað aftur á landgrunninum nú eftir ein longri stegð. Men hann heldur eisini, at tað er spell, nú feløg hava gjørt av at bora, at tað ikki hevur eydnast at hava tvær boringar í forlongilsi av hvørjari aðrari í 2006. Tað liggur nevniliga í kortunum, at BP borar í 2007, meðan Statoil eftir øllum at døma borar í 2006.

- Tá tíðarskeiðini verða ov stutt, verður tað sera stríggið at fáa mobiliserað tvs. at fáa alt upp at standa rundan um eina boring. Tú er ikki meira enn komin í gongd, so skal tú gevast aftur fyri so árið eftir at byrja av nýggjum. Magni Arge sigur víðari, at tað besta hevði verið bæði fyri oljufeløgini og fyri føroysku tænastuvinnuna, um teir báðir brunnarnir á basaltinum vórðu boraðir sama árið, soleiðis at sami logistikkur varð brúktur yvir eitt longri tíðarskeið. Allir partar høvdu verið hugaðir at gjørt tað, um tað bar til. Hetta hendi m.a. í fyrstu útbjóðing, og tað var sera gott fyri vinnuna.

Uppá fyrispurning hví hetta ikki ber til sigur Magni Arge, at tað kann hava fleiri orsøkir. Ein er tann, at feløg eru kanska ikki tilreiðar at fara undir at bora næsta ár, ein onnur kann vera tann, at tað er so torført at fáa ein boripall. -Vit hava sjálvandi onga ávirkan á, nær oljufeløgini halda seg vera klár til at bora, men tað hevði verið gott fyri okkara vinnulív, um vit fingu tveir brunnar í 2006 heldur enn ein tá og ein í 2007.

*-Best hevði verið um tveir brunnar vórðu boraðir í 2006 heldur Magni Arge, stjóri*



# Føroyska luttøkan í oljuvinnuni u

**- Tað, sum upp á sikt tænir okkum best í løtuni, er, at føroysk feløg fáa ein leiklut í oljuvinnuni uttanlands, eins og eitt nú Atlantsflog hevur fingið sáttmálar í Noregi og Thor í Hósvík hevur fingið sáttmálar ymsastaðni kring knøttin við sínum virksemi. Á henda hátt kunnu føroysk feløg luttaka í oljuvirksemi alt árið, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum. Formaðurin í havnanevndini hjá Runavíkar kommunu, Klæmint Østerø, er samdur við stjóran í Vinnuhúsinum**

OLJULEITING
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, er samdur við Magna Arge, stjóra í Atlantsflogi um, at tað hevði tænt føroysku tænastuvinnuni betur, um ætlaðu boringarnar á føroyska landgrunninum hjá ávikavist Statoil í 2006 og boringin hjá BP í 2007, høvdu ligið í forleingilsi av hvørji aðrari og ikki í hvør sínum ári, sum annars liggur í kortunum.

Teir halda báðir, at tá ið tíðarskeiðið er so stutt, sum tað vanliga er í einum boriskeiði, er torført hjá tænastuvinnuni í Føroyum seta nakað veruligt á kjøl.

Stjórin í Atlantsflogi heldur, at tað bæði hevði tænt føroysku tænastuvinnuni og oljufeløgunum, um báðir brunnarnir, sum skulu borast á basaltinum, vórðu boraðir í sama ári.

- Hetta hendi eitt nú í fyrstu útbjóðingini, og tað kom sera væl við hjá vinnuni, sigur Magni Arge.

Men ymiskar orsøkir kunnu liggja til grunds fyri, at brunnarnir ikki verða boraðir í sama ári.

## Upp á sikt

Jan Mortensen ivast ikki í, at tænastuvinnan hevði fingið mest burtur úr boringunum, um tær lógu hvør eftir aðrari, tí tá hevði tíðarskeiðið, har virksemið var í landinum, verið longri.

Stjórin heldur hinvegin, at tað er ikki hetta, sum hevur størstan týdningin fyri føroysku tænastuvinnuna.

- Tað, sum upp á sikt tænir okkum best í løtuni, er, at føroysk feløg fáa ein leiklut í oljuvinnuni uttanlands, eins og eitt nú Atlantsflog hevur fingið í Noregi og Thor í Hósvík hevur fingið ymsastaðni kring knøttin við sínum virksemi. Á henda hátt kunnu føroysk feløg luttaka í oljuvirksemi alt árið.






*Thor í Hósvík hevur rættiliga gjørt vart við seg sum veitarar í oljuvinnuni kring um heimin*

Jan vísir á, at boringarnar vanliga ikki taka langa tíð, men nú farast skal niður ígjøgnum basaltið, er væntandi, at tíðin verður nakað longri, enn hon hevur verið við undanfarnu boringar.

- Eg dugi ikki at meta um, hvussu langa tíð hesar boringar fara at taka, men eg kann hugsa mær, at sjálvar boringarnar fara at vara nakað longri enn ein mánaða, kanska tveir mánaðir ella meira.

Hann sigur, at basaltfláirnar eru ringar at bora – og farið verður langt niður.

Jan sigur, at eitt eru so sjálvar boringarnar; annað er fyrireikingarnar, áðrenn borurin verður settur í havbotnin.

- Eg vóni sjálvsagt, at føroyska tænastuvinnan fer at fáa nakað burtur úr hesum – men ikki minst; at teir aktivitetir, sum verða her heima, meðan borað verður, fara at skapa fleiri føroyskum feløgum enn higartil møguleikar í oljuvinnuni uttanlands

Hann vísir á, at sum er, eru tað ikki onnur føroysk feløg enn Atlantsflog og Thor, sum hava nakað munandi virksemi í oljuvinnuni uttanlands.

- Men kanska verður møguleikin, sum nú stendur fyri framman, startskotið hjá øðrum feløgum at fáa lut í hesi vinnu, sigur hann.

# ttanlands hevur størsta týdningin



*- Nú leitað verður eftir olju so tætt uppat føroyska markinum, og tað kanska er skjótari at sigla higar til lands enn til Stavanger ella Aberdeen, eru avgjørt møguleikar hjá føroyskum fyritøkum at liggja fram við og blanda seg upp í kappingina sum veitarar, heldur Klæmint Østerø, formaður í havnanevndini hjá Runavíkar kommunu*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*




*- Vit hava verið spentir hvørja ferð, borað hevur verið á landgrunninum, og soleiðis verður eisini hesaferð, nú borurin um ikki so langa tíð verður settur á basaltið, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Basin í Runavík

Jan Mortensen væntar, at oljubasin á havnalagnum hjá Runavíkar Havn fer at verða nýttur, nú Statoil og BP komandi árini fara at bora á føroyska landgrunninum.

Hann vísir á, at eftirmetingar eru gjørdar av, hvat aktivitetirnir hava lagt eftir seg, og hann ivast onga løtu í, at nakað liggur eftir, tá ið borað verður á landgrunninum.

- Men, sum sagt; tað, sum eg haldi hevur størstan týdning í løtuni, er, hvat fáast kann burtur úr uttanfyri Føroyar í komandi árum.

Jan vónar sjálvsagt eins og flestu føroyingar, at vit sum frá líður fara at fáa eina oljuvinnu, sum kann geva føroyska samfelagnum eitt íkast, men hann ásannar, at hetta eftir øllum at døma liggur nøkur ár frammi í tíðini.

- Vit hava verið spentir hvørja ferð, borað hevur verið á landgrunninum, og soleiðis verður eisini hesaferð, nú borurin um ikki so langa tíð verður settur á basaltið.

Stjórin í Vinnuhúsinum hevur eisini heft seg við, at feløgini, sum standa aftanfyri komandi boringarnar, eru bjartskygd.

- Men soleiðis hevur tað eisini verið áður – og vit kunnu bara vóna tað besta, sigur Jan Mortensen.

## Fitt av virksemi

Klæmint Østerø, sum er formaður í havnanevndini hjá Runavíkar kommunu og er útbúgvin verkfrøðingur, sigur, at kommunan kennur sína skyldu sum veitari á bryggjuni.

- Oljufeløg og landsmyndugleikar hava gjørt av, oljuútgerðarhavnin liggur á økinum hjá Runavíkar Havn, og kommunan fer at gera alt fyri, at útgerðarhavnin hjá oljuvinnuni verður varðveitt í kommununi.

Tí er Klæmint heldur onga løtu í iva um, at tað aftur hesaferð fer at verða fitt av tænastuvirksemið í økinum sambandi við komandi oljuleiting undir Føroyum.

- Jú, hetta gevur rættiliga stórt virksemi á landi, sigur hann.

Klæmint vísir á, at Statoil fer at bora við einum flótandi boripalli, og hetta gevur uppaftur meira virksemi, enn tá ið borað verður við einum boriskipi.

- Eitt boriskip hevur tað mesta av útgerðini umborð, meðan ein flótandi boripallur fær ein nógv størri part av útbúnaðinum úr landi, og tað verður so í hesum førinum av oljuútgerðarhavnini í Runavíkar kommunu.

Hann sigur, at vanligt er, tá ið flótandi boripallar verða nýttir til leiting, verður pallurin forsýnaður so hvørt.

## Møguleikar

Klæmint er samdur við Jan Mortensen, stjóra í Vinnuhúsinum um, at tað, sum hevur størstan týdning, er, hvat spyrst burtur úr føroysku luttøkuni í sambandi við oljuvinnu aðrastaðni.

- Nú leitað verður eftir olju so tætt uppat okkum, og tað kanska er skjótari at sigla higar til lands enn til Stavanger ella Aberdeen, eru avgjørt møguleikar hjá føroyskum fyritøkum at liggja fram við og blanda seg upp í kappingina sum veitarar

Hann heldur, at føroyskir veitarar kanska í ov stóran mun hava satsa upp á oljuvinnuna í Føroyum, men hava hugt ov lítið eftir møguleikum uttanfyri landoddarnar.

- Tí er at vóna, at føroyskar fyritøkur hesaferð fara at hyggja meira eftir, hvat spyrjast kann burtur úr hesi vinnu upp á sikt, sigur Klæmint Østerø, formaður í havnanevndini hjá Runavíkar kommunu.




*Atlantsflog hevur fingið stórar sáttmálar um flutning í sambandi við norsku oljuvinnuna*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*